# Útlendskur kapitalur trýstir politiska skipan

**- Við útlendskum áhugamálum í veiðiliðnum kunnu vit fáa trupulleikar við at regulera fiskiskapin politiskt. Gerast útlendsku áhugamálini ov sterk, kunnu tey leggja trýst á politisku skipanina, siga tveir av fyrireikarunum av fiskivinnuráðstevnuni í Klaksvík, Auðunn Konráðsson og Óli M. Lassen**

RÁÐSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinastu árini eru hendar sera stórar broytingar innan okkara fiskivinnu. Alt fleiri skip verða handlað, ið ikki hava grundarlag í rakstrinum hjá skipunum. Heldur er hetta ein roynd at tryggja sær veiðirættindi.

Auðunn Konráðsson og Óli M. Lassen vísa á, at tilgongdin, sum vit hava sæð í føroyskari fiskivinnu á sjónum, í fleiri førum er íkomin í tøttum samstarvi við útlendsk áhugamál.



*- At útlendskur kapitalur er uppi í føroyskari fiskiskipavinnu, hevur fullkomiliga avskeplað okkara samfelag, siga Auðunn Konráðsson og Óli M. Lassen (mynd), sum saman við Jákupi Sólstein skipaðu fyri fiskivinnuráðstevnuni í Klaksvík*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Útlendsk ávirkan

- Ungir føroyingar hava havt lætt við at komið sær inn í vinnuna, um samstarvsfelagarnir hava verið teir røttu. Hetta samanspæl millum føroysk og útlendsk áhugamál hevur gjørt, at føroysk skip við veiðirættindum eru vorðin sera kostnaðarmikil. Vit hava eisini sæð, at tað eru útlendskir eigarar og fíggingarstovnar, ið eru við til at fíggjar hesar verkætlanir.

Auðunn og Óli ásanna, at henda gongd hevur gjørt tað alsamt truplari hjá einum føroyingi at fara í ein føroyskan fíggingarstovn at fíggja tílík skipakeyp.



*- Tað er undrunarvert, at politiska skipanin í Føroyum hevur loyvt útlendskum áhugamálum at fáa lut í ogn Føroya fólks*
*Mynd: Yngve Olsen*

### Kapitalur trýstir

Teir báðir vísa eisini á, at við útlendskum áhugamálum í veiðiliðnum, kunnu føroyskir myndugleikar fáa trupulleikar við at regulera fiskiskapin politiskt.

- Gerast útlendsku áhugamálini ov sterk, kunnu tey leggja trýst á politisku skipanina.

Auðunn Konráðsson og Óli M. Lassen undra seg yvir, at politiska skipanin í Føroyum hevur loyvt útlendskum áhugamálum at fáa lut í ogn Føroya fólks.

- Hetta hevur fullkomiliga avskeplað okkara samfelag, samstundis sum vit ikki hava sama møguleika at keypa okkum inn í flotan hjá okkara grannalondum, siga teir.

# – Mugu ikki koma aftur í áttatiárini

**Ein avleiðing av, at virkir og skip aftur eru undir sama hatti, kann gerast, at fiskaprísurin verður ávirkaður – skeiva vegin. Hesum ávarða Auðunn Konráðsson og Óli M. Lassen ímóti**

RÁÐSTEVNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

At virkir og skip hanga saman undir sama eigara, hevur verið roynt áður í Føroyum. Nú er hetta mynstrið av álvara við at taka seg uppaftur. Feløg, sum eiga virkir, hava seinnu árini keypt sær skip – og summir virkir eiga nú fleiri skip.

- Vit kunnu bara vóna, at royndin hesaferð fer at eydnast betur, enn hon gjørdi í fyrru royndini.

### Fall í fiskaprísum

Auðunn Konráðsson og Óli M. Lassan vísa til metingar hjá skipsmanningunum.

- Hesir halda, at ein skipan, har virkir og skip eru so tætt knýtt at hvørjum øðrum, lætt kann ávirka fiskaprísin tann skeiva vegin. Haraftrat kemur, at við útlendskum áhugamálum í veiði-og virkisliðnum, kann avleiðingin verða, at ein minni partur av okkara útflutningsvirði liggur eftir í Føroyum.

Teir báðir ásanna kortini, at hugsandi er eisini, at slíkt samstarv millum føroysk og útlendsk áhugamál kann føra til økt útflutningsvirði og betrað kappingarføri hjá samlaðu fiskivinnuni.

- Men hetta fer tíðin at vísa, leggja teir aftrat.

### Ikki í 80'ini

Auðunn og Óli halda, at ansast má eftir, at vit ikki koma aftur í somu støðu sum í áttatiárunum.

- Høgu oljuprísirnir, hækkandi rentustøðið, vánaligi fiskiskapurin og trupulleikar við at fáa manning, kunnu í longdini tyngja munandi um raksturin av okkara fiskiflota – og fiskavirkisvinnu.

Teir báðir reisa tí spurningin, um trupulleikarnir í høvuðsvinnuni ikki eru tekin um, at vit nærkast "onkrum slagi av kreppu" í samfelagnum, sjálvt um tað neyvan er væntandi, at hetta verður eins og í áttatiárunum, tá virkir og skip vóru tengd at hvørjum øðrum.

### Vánaligt lønsemi

- Sum heild er lønsemið hjá feskfiskaflotanum ikki serliga gott. Hesin parturin av flotanum skapar ikki meira tøkan pening, enn flotin hevur brúk fyri til viðlíkahald og uppgraderingar av skipunum.




*Nú virkir keypa skip inn undir seg, ávarða Auðunn Konráðsson og Óli M. Lassen ímóti teirri støðu, vit vóru í, tá virkir og skip hingu saman í sínari tíð*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Auðunn Konráðsson og Óli M. Lassen halda ikki, at vit kunnu tosa um metlønsemi hjá einum fiskiflota, sum ikki megnar at endurnýggja seg – og har fleiri skip eisini hava rakstrartrupulleikar.